# Lotte Rømer tosar um hoyribrek

**Danska tónlistarkvinnan Lotte Rømer vitjar í Føroyum. Hon fer at halda tríggjar fyrilestrar og eina konsert**

HOYRIBREK
*Turið Kjølbro*

Kenda danska tónlistarkvinnan Lotte Rømer vitjar í vikuni Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum. Á vitjanini eru umframt tríggir fyrilestar eisini konsert á skránni. Lotte Rømer er fyrst og fremst kend sum sangari, tónleikari og tónaskald, men við árunum er hon vorðin framúrskarandi undirhaldari. Hon dugir at undirhalda øllum aldursbólkum. Einsamøll frammanfyri flyglið gleðir hon áhoyrararnar við egnum sangum og sangum hjá øðrum. Alt knýtt saman við skemti, hita og innliving.

Samstundis sum hon hevur havt framgongd á tónlistaliga økinum, hevur hon fingið vaksandi trupulleikar við hoyrnini, tí eitt viðføtt arvaligt hoyribrek hevur verið við til at broyta gerandisdag hennara. Tað hevur givið henni nýggj sjónarhorn í lívinum. Í 1997 hav hon út bókina ”Sølvfuglens vinger“, sum eru endurminningar úr danska rockheiminum. Síðani hevur hon skrivað “Hva?” sum sítt egna hoyribrek og umstøðurnar hjá hoyribrekaðuim sum heild. Hetta hevur gjørt hana til ein nógv eftirspurdan fyrilestrarhaldara og gav áhoyrarunum møguleika fyri at uppliva Lotte Rømer frá eini heilt nýggjari síðu. Hon fortelur bart út og undirhaldandi sum sítt egna brek og um at hava trupulleikar við hoyrnini. Hon er von við at standa á palli og hevur stóran samfelagsligan áhuga, og tí er hon livandi prógv um, at ein hoyribrekaður kann broyta nógv við at vera opin um brekið og sjálvur gera vart við tað.



*Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum fær vitjan av donsku sangarinnuni, tónleikaranum og fyrilestrarhaldaranum Lotte Rømer*

Fyrilestrarnir á Føroyavitjanini hjá Lotte Rømer vera hóskvøldið 21. juni kl. 19.30 í MBF-Húsinum á Íslandsvegi 10C. Ókeypis atgongd. Leygardagin 23. juni kl. 16.00 í Runavíkar skúla, og sunnudagin 24. juni kl. 17.00 í Býráðshúsinum í Klaksvík. Í Runavík og í Klaksvík fer Lotte Rømer at spæla nakrar sangir undir fyrilestrinum.

Øll eru vælkomin. Kostnaður er 20 krónur. Fríggjakvøldið 22. juni hevur Lotte Rømer konsert í Listaskálanum í Havn, sum hon kallar One Woman and a Grand Piano.

Hoyribrek er ein vaksandi trupulleiki, 15 prosent av øllum teimum tilkomnu í øllum ídnaðarlondunum hava niðursetta hoyrn og/ella tinnitus. Kortini eru trupulleikar við hoyrnini nakað, ein ikki tosar um. Tað er ringt at viðganga, at ein hoyrir illa og ofta hevur tað sera stórar sosialar og menniskjansligar avleiðingar. At hava trupulleikar við hoyrnini er eitt dult brek, sum onnur seta í samband við tað at vera gamal, tornæmur ella eitt sindur látúrligur. Men vánalig hoyrn kann raka fólk í øllum aldri. Í Føroyum eru í løtuni umleið 3000 hoyritólsbrúkarar.

# Lótu gallarí upp í Fuglafirði



*Danski listamaðurin, Petur Kjarulff Schmidt, hevur fyrstu framsýningina í Gallarí Riberhús í Fuglafirði*

**Sunnudagin var fernisering í Riberhúsi í Fuglafirði, har kendur danskur listamaður hevur framsýning komandi vikurnar**

LIST
*Eyðun Klakstein*

**Fuglafjørður**: Sunnudagin lat Gallarí Riberhús upp í Fuglafirði. Talan er um nýtt tiltak, sum listafólk í Fuglafirði hava tikið stig til.

Ætlanin er at hava framsýningar av ymsum slagi í Riberhúsi, og fyrsta framsýningin er við kenda danska listarmanninum, Palle Kjarulff Schmidt. Hendan framsýningin lat upp sunnudagin og verður at síggja komandi vikurnar.

## Gjørdu nógv burturúr

Tað var hátíðardámur í Riberhúsi, tá nýggja gallaríið lat upp sunnudagin. Petur Martin Petersen hugleiddi um Riberhús, formaðurin í mentanarnevndini hjá Fuglafjarða kommunu, John Heri Joensen, helt røðu, og klarinettónleikur var á skránni.

Yrkjarin, Alexander Kristiansen, læs yrkingar upp, sum hann hevði týtt úr japanskum til høvi. Teamið í fyrstu framsýningin er úr Japan.

Højgaards Handilsvirki eigur Riberhús, og tað er við vælvild frá fyritøkuni, at gallaríið hevur fingið innivist har.

Riberhús varð bygt í 1910 og varð brúkt sum goymsluhús. Navnið fekk húsið av einum hjóldampskipi, sum sigldi vøru av ymsum slagi til Fuglafjarðar.



*Alexander Kristiansen læs yrkingar, sum hann hevði týtt úr japanskum til serliga høvið*

# Føroyskir dagar í Ólafsvík

**Úr øllum heraðshornum stevna føroyingar og íslendingar til føroysku dagarnar, sum verða í Ólafsvík í Íslandi í døgunum 29. juni til 1. juli**

HÁTÍÐ
*Turið Kjølbro*

Aftur í ár verða føroyskir dagar í Ólafsvík í Íslandi í døgunum 29. juni til 1. juli. Tað er Føroyingafelagið í Ólafsvík, sum skipar fyri.

Á skránni verður mangt og hvat. Marknaður við luttøku av 25 fyritøkum, undirhald fyri børn við eitt nú hoppiborg og tivoli, sangkapping fyri børn, bryggjuball, har Hans Jakob og vinfólk úr Vági spæla til dans, motorcrosskapping, fiskikapping, golf-kapping, og sýning av føroyskum lutum. Úr Vestmanna koma 70 kórsangarar, íroknað eitt barnakór. Millum hesi eru eisini tvey handbóltslið, 12 og 16 ára gomul børn, sum fara at spæla ímóti liðum úr Kópavági. Úr Hvalba koma 10-12 ára gomul børn, sum fara at spæla fótbólt ímóti Ólafsvík. Á middegi leygardagin verður borðreitt við røstum kjøti. Leygarkvøldið heldur Hjalmar Árnason, tingmaður, røðu um Føroyar. Føroyski dansibólkurin Twilight spælir til dans leygarkvøldið til tíðliga sunnumorgunin. Sunnudagin hevur Inga Poulsen Dam gudstænastu.

Øll tiltøkini uttan dansurin leygarkvøldið eru ókeypis.

Føroysku dagarnir í Ólafsvík eru ógvuliga væl vitjaðir. Fyrsta árið vóru 2000 fólk við í tiltakinum, árið eftir 3000 og í fjør 4000 fólk. Undirtøkan í ár verður ikki minni, rokna tey við í Íslandi.

- Íslendingar taka ógvuliga væl undir við tiltakinum og eru líka spentir sum vit føroyingar. Úr øllum heraðshornum í Íslandi stevna føroyingar og íslendingar til føroysku dagarnar. Tað er sum á ólavsøku. Eisini, ið vantar, er kappróðurin, sigur vágbingurin Finnur Gærdbo, sum saman við Torgrími Ólavson, eisini ættaður úr Vági, hevur tikið stig til tiltakið.

Í Ólafsvík, sum liggur á Vesturlandinum, búgva bert tríggir føroyingar nú. Í 1958 vóru ikki færri enn 120. Tá búðu í alt 800 fólk í Ólafsvík.



